Bygdaráðsfundur

Hvalbiar Kommuna

Dagfesting: 22.06.2026 kl. 18.00

Á fundi:	Poul Laust Christiansen
	Jóhannes Liasson Rasmussen
	Jónfinn L. Poulsen
	Thorstein Thomsen (fyri Otto West)
Ikki møtt:	Janus Thomsen
	Rakul Mørk
	Ronni Hammer
Skrivari:	Johanna B. Djurhuus

1. **104-1-2025: Fyrispurningur - byggisamtyktin.**
   Fyrispurningum um broyting av byggisamtyktini á Fiskieiðinum í sambandi við frítíðarhús. Ognin liggur í umráðisparti H: Friðað øki, har ongin bygging ella arbeiði kunnu fremjast uttan við góðkenning frá avvarðandi myndugleikum og sambært serstakari byggiætlan.
   Tekniska nevnd 16.06.2026:
   Víst verður á, at hetta eru fornminni og mælir nevndin til, at byggisamtyktin verður óbroytt.
   Avgerð:
   Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá nevndini, so økið verður varðveitt sum friðað øki.

2. **102-39-2026: Skriv frá Umhvørvisstovuni viðvíkjandi navni á vegi.**
   Umhvørvisstovan hevur í samráð við Landsverk og politiið uppskot um, at vegurin frá Nesvegi til tunnilin skal eita ”Tunnilsvegurin inni á Dal”.
   Avgerð:
   Samtykt varð einmælt at mæla til, at vegurin kemur at eita “Hvalbiarvegurin”.

3. **Ikki alment mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 19.00

Poul Laust Christiansen — Jóhannes Liasson Rasmussen

Thorstein Thomsen — Jónfinn L. Poulsen